

TERNUTÚN

Íbúðarbygging við Sundsvegin


Kunnandi fundur 1. juni 2026

Byggiharri: Sámal Jákup Joensen • Arkitektar: Hannis Egholm og Mikael Viderø



TERNUTÚN

MATR. NR. 1458a • VIÐ SUNDSVEGIN, TÓRSHAVN



Ternutún er íbúðarverkætlan á matr. nr. 1458a við Sundsvegin í Havn.

Ætlanin umfatar 84 íbúðir í fýra ymiskum støddum deildar yvir 8 íbúðareindir og við felagshúsi, har seks tiltaksíbúðir eru, sum kunnu brúkast sum gestaíbúðir hjá teimum, ið búgva í Ternutúni. Eisini er ætlanin, at í felagshúsinum skulu eldru íbúgvarnir kunna fáa hárviðgerð, fysioterapi o.a.

Parkering er í høvuðsheitum skipað ímillum eindirnar, og pláss er fyri 80 bilum.

Atkoma til Ternutún í bili verður frá Sundsvegnum, men gott gøtusamband er við Bussleiðina, bæði við Villingardalsvegin, Sundsvegin og Norðara Ringveg.

TERNUTÚN




Ríkiliga fríøkið leggur seg nattúrliga upp at og afturat verandi kommunala fríøkinum, og Ternutún verður knýtt í verandi gøtuskipan í økinum frá Berjabrekku, Villingadalsvegnum, Sundsvegnum og Norðara Ringvegi.

Frástøðan frá Berjabrekku, sum liggur einar 20 metrar hægri í lendinum, er 120 metrar, meðan frástøðan frá Norðurlandahúsinum er einar 110 metrar.

Viðarlundin í Sortudýki, sum er næsti granni hjá parti av Ternutúni ger, at íbúðarbyggingin neyvan sæst frá Norðurlandahúsinum.


TERNUTÚN

SAMLAÐ VÍDD Á GRUNDØKI: 10.907 M² (TINGLÝST)
BYGGISTIG: 2.104 M² = 0,19
NÝTSLUSTIG: 6.224 M² = 0,57
TAL AV ÍBÚÐUM: 84 (+ 6 TILTAKSÍBÚÐIR Í FELAGSHÚSI)
P-PLÁSS: 80
GRØNT ØKI: ~4.000 M² = ~0,36
FELAGSHÚS: 466 M²




STØÐUMYND 1:500


TERNUTÚN




LENDISSKURÐUR A-A 1:1000




LENDISSKURÐUR B-B 1:1000



LENDISSKURÐUR C-C 1:1000



ÍBÚÐ A • 50,3 M² • MÁT 1:100



ÍBÚÐ B • 67,5 M² • MÁT 1:100

Íbúðirnar

Ætlanin er, at fýra sløg av íbúðum skulu vera í Ternutúni.
Felags fyri tær allar er, at tær eru vælegnaðar til eldri og rørslutarnað fólk - bæði hvat víðvíkur atkomu og innrætting.
Atgongd til allar íbúðirnar á teimum báðum ovaru hæddunum er gjøgnum lyftu ella trappu og altangong. Altangongirnar eru í høvuðsheitum á tí síðuni av íbúðareindunum, sum venda burtur frá útsýni og sólargangi.
Allar íbúðirnar hava egna altan ella terrassu.


Íbúð A

Íbúð A er 50,3 fermetrar í støddd og er serliga vælegnað til støk eldri fólk og ung.
Har er eitt kamar umframt køkur, stova og baðirúm.


Íbúð B

Íbúð B er 67,5 fermetrar.
Har eru sovikamar, kamar, køkur, stova og baðirúm.

TERNUTÚN



ÍBÚÐ C • 79 M² • MÁT 1:100



ÍBÚÐ D • 95,6 M² • MÁT 1:100

Íbúð C

Íbúð C er 79 fermetrar.
Har eru sovikamar, kamar, køkur, stova og baðirúm.

Íbúð D

Íbúð C er 95,6 fermetrar.
Har eru sovikamar, 2 kømur, køkur, stova og baðirúm.


Ætlanin er, at í Ternutúni skulu vera 35 A-íbúðir, 18 B-íbúðir, 19 C-íbúðir og 12 D-íbúðir.
Allar íbúðirnar hava egið goymslurúm, á leið 5 fermetrar stórt.

Íbúðirnar verða hitaðar við fjarhita ella aðrari grønari orkuloysn.


TERNUTÚN

HÆDD TIL TEKJUTROM: 9 M

MESTAHÆDD TIL MØNU: 10,7 M



LONGDARSKURÐUR Í EIND 5



TVØRSKURÐUR

SKURÐIR

Takhallið á øllum bygningseindum er 5 stig.

Bygningseindirnar eru bygdar við 9 metra hædd til tekjutrom, meðan mesta hædd til mønu (í eind 5) er 10,7 metrar.

TERNUTÚN



ÍBÚÐAREIND 6 MÓTI LANDSYNNINGI



ÍBÚÐAREIND 8 MÓTI LANDNYRÐINGI

Allar íbúðirnar hava altan við góðum sólargangi, sum víst á døminum omanfyri.

Á atkomusíðuni eru altangongir á teimum báðum ovaru hæddunum. Frá teimum er umframt atgongd til íbúðirnar, atgongd til trappu og lyft og goymslurúmini, sum hoyra til íbúðirnar.



Íbúðarbyggingin Ternutún verður gjørd soleiðis, at hon bæði í skapi, tilfarsvali og litum lagar seg sum mest til tað umhvørvi, hon er í.
Á ovaru myndini sæst, hvussu verandi kommunala gøtuskipanin í umráðnum verður knýtt í tún og gonguteigar í Ternutúni, meðan tann niðara gevur eina mynd av, hvussu frástøðan frá Berjabrekku, Norðurlandahúsinum og grannum annars verður.

